# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | Skrivið her |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | Skrivið her |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
(Áseting um KT-skipanir, KT-útgerð, netsamband og dátutrygd)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr.125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, verður gjørd henda broyting:

**1.** § 47, stk. 4 verður orðað soleiðis:
“ *Stk. 4.* Kommunustýrið hevur ábyrgdina av rakstrinum av skúlunum í kommununi og ásetur árliga fíggjarkarmin fyri einstaka skúlan. Raksturin fatar eisini um KT- skipanir, KT-útgerð, netsamband og dátutrygd.”

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Krøvini til KT-trygd og verju av persónsupplýsingum eru seinastu árini vorðin alsamt meir umfatandi og eru farin serliga at krevja meir av teimum, ið umsita persónsupplýsingar – bæði umsitingarliga, men eisini fíggjarliga. Útreiðslur til KT-trygd eru í dag vorðnar ein fastur og natúrligur partur av rakstrarútreiðslunum hjá stovnum og fyritøkum.

Krøvini til KT-trygd og verju av persónsupplýsingum, ið almennir stovnar skulu lúka, eru at finna í dátuverndarlógini og í rundskrivinum um KT-trygd.

Virksemi fólkaskúlans verður stýrt sambært fólkaskúlalógini og teimum kunngerðum, ið eru lýstar við heimild í fólkaskúlalógini. Fyrisiting av skúlanum liggur hjá "Skúlamyndugleikanum á staðnum", ið eru kommunustýrið og skúlastýrið.

Kommunustýrið hevur ábyrgd av, at íbúgvarnir í kommununi fáa ta undirvísing, ið fólkaskúlalógin ásetur, at fígging og høli eru tøk, og at øll undirvísingarskyldug børn í kommununi eru innskrivað í fólkaskúlan. Kommunustýrið ger uppskot til skúlabygging og skúlabygnað kommununnar. Harumframt hevur kommunustýrið ábyrgdina av rakstrinum av skúlunum í kommununi og ásetur fíggjarkarmin fyri einstaka skúlan.

Fyrisitingin av fólkaskúlanum er býtt millum fleiri ymiskar myndugleikar. Fólkaskúlin er tí partvís undir kommunalum ræði og partvís undir ræði landsstýrismansins, og partarnir hava í felag ábyrgd av skúlanum.

Hóast landsstýrismaðurin er ovasti fyrisitingarligi myndugleiki í skúlaverkinum sum heild, so hevur hann sera avmarkaðar heimildir mótvegis kommununi. Sambært ásetingini um kommunala sjálvræði í § 56 í stýrisskipanarlógini, kunnu viðurskiftini hjá kommununum bert skipast við lóg. Tað vil siga, at um landsstýrismaðurin skal leggja byrðar ella skyldur á kommununa, skal lógarheimild verða fyri hesum.

Tvíbýtta ábyrgdin ger, at ávís viðurskifti kunnu tykjast ógreið. Um hugt verður eftir teimum reglum, ið eru nevndar omanfyri, so er eingin ivi um, at bæði almennir og kommunalir stovnar skulu halda dátuverndarlógina. Bæði kommunur og land hava tí skyldu til at syrgja fyri, at viðurskiftini í skúlunum eru í samsvari við krøvini í dátuverndarlógini.

Hetta er ikki líka greitt, tá hugt verður eftir rundskrivinum um KT-trygd. Rundskrivið er lýst av landsstýrismanninum í fíggjarmálum við heimild í málsøkjabýtinum. Rundskrivið fevnir tí bert um almennar stovnar og ikki um kommunala geiran. Tað vil í stuttum siga, at landsstýrismaðurin og allir stovnar (og starvsfólk) undir landsstýrismanninum eru bundin at fylgja ásetingunum í rundskrivinum.

Ein skúlaleiðari hevur tí skyldu til at skipa so fyri, at tann stovnurin, ið viðkomandi varðar av, fylgir rundskrivinum. Men skúlaleiðarin er eisini avmarkaður av tí fígging, ið kommunan letur til rakstur av skúlanum, og hóast skúlaleiðarin er bundin av rundskrivinum, so er kommunan ikki bundin at fylgja tí. Tað er eisini ógvuliga ivasamt, um landsstýrismaðurin hevur heimild til at áleggja kommununi at gjalda rakstrarútreiðslurnar til KT-trygd. Talan er

um eina rakstrarútreiðslu, ið ikki beinleiðis er ein fylgja av reglunum í fólkaskúlalógini, og talan er tí neyvan um eina fíggjarliga skyldu, ið er umfatað av § 57, stk. 11 í fólkaskúlalógini.

Skúlaleiðarin kann tí koma í eina støðu, har landsstýrismaðurin áleggur einum skúlaleiðara at fylgja ásetingunum í rundskrivinum, men at skúlaleiðarin ikki fær neyðugu fíggingina frá kommununi til at halda ásetingarnar. Í slíkari støðu er tað ógvuliga ivasamt, um landsstýrismaðurin hevur nakran møguleika at noyða kommununa at gjalda. Var hinvegin talan um eina kommunu, ið ikki vildi rinda fyri skúlabøkur ella olju, so er helst talan um eina fíggjarliga skyldu, ið er umfatað av § 57, stk. 11.

Í dag verða hesar útreiðslur roknaðar sum rakstrarútreiðslur, og tískil er hetta ein útreiðsla, sum kommunurnar bera. Tó kann hugsast, at hetta gerst ein trupulleiki í ávísum kommunum í sambandi við, at útreiðslurnar vaksa, tá ið krøvini verða herd.

Endamálið við uppskotinum er, at allar kommunur virka fyri, at fólkaskúlarnir verða partur av KT-heildarætlanini og kunnu fullnýta møguleikarnar bæði við atliti at Skúlaneti og lestrarfyriskipanini, sum verða sett í verk fyri samlaða skúlaverkið.

Eisini er endamálið, at verandi reglur gerast greiðari, so tað ikki verður ein spurningur um tulking av "rakstrarútreiðslum", um hvør einstakur skúli fíggjarliga hevur møguleika fyri at røkja sínar skyldur innan KT-trygd og verju av persónsupplýsingum.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóggáva tilskilar, at kommunurnar hava ábyrgd av rakstrinum av skúlunum í kommununi, men ásetur ikki, at kommunurnar skulu verða partur av eini felags KT-skipan fyri alt skúlaverkið.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at útvega lógarheimild fyri, at allar kommunur virka fyri, at fólkaskúlarnir verða partur av KT-heildarætlanini og kunnu fullnýta møguleikarnar bæði við atliti at Skúlaneti og lestrarfyriskipanini, sum verða sett í verk fyri samlaða skúlaverkið.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Ásetingar verða gjørdar, so at allir fólkaskúlar, foreldur og næmingar hava javnbjóðis møguleikar at nýta Skúlanet og lestrarfyriskipanina. Harumframt verður økt um KT- og dátutrygdina, og vit fáa eina tryggari skrásetingarskipan, sum ikki hevur staðið mát við tað, sum kravt verður, og sum bæði Landsgrannskoðan og Dátueftirlit hava víst á.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal
Arbeiðsbólkur við umboðum frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Kommunufelagnum, Undirvísingarstýrinum, Námi og Føroya Lærarafelag hevur viðgjørt økið, og hvussu tað kann verða samskipað. Sum er, eru fleiri skipanir innan økið, og eingin samskipan er millum skipanirnar. Kommunurnar og Nám varða av flestu skipanunum. Eisini er sera ymiskt, hvussu dátutrygdin er í skúlunum kring landið. Semja er um, at tørvur er á at endurnýggja og umskipa KT-virksemið í fólkaskúlanum. Harumframt hava avvarðandi partar havt lógaruppskotið til ummælis, Kommunufelagið, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagið, Undirvísingarstýrið og Nám umframt stjórnarráðini.

Eitt ummælisskjal eigur eisini at verða gjørt. Ummælisskjalið er ein stuttur samandráttur av innkomnu ummælunum saman við viðmerkingum hjá landsstýrismanninum til hesi. Serliga til uppskot, har nógv ummæli eru innkomin, er ummælisskjal eitt hent amboð, sum gevur greitt yvirlit yvir tey ummælini, sum eru komin inn.

Ummælini verða løgd við sum fylgiskjal til lógaruppskotið. Hvørt ummæli skal í skjal fyri seg, og skjalið skal vera í PDF-sniði.
(Sí nr. 1.2.1.6. í rundskrivinum um lógarsmíð).

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Á fíggjarlógini er játtan sett av til at menna eina KT-heildarætlan til alt skúlaverkið, sum umfatar skúlanet og lestrarfyriskipan. Kommunurnar hava higartil rindað bæði fyri netskipan og kt-útgerð. Kommunur rinda, sum er, fyri netskipanina í einstaka skúlanum. Í skipanini við skúlaneti fara kommunurnar í staðin fyri at rinda fyri egið net at rinda ávíst gjald fyri at nýta skúlanet. Mett verður ikki, at hetta førir til stórvegis eyka kostnað, meðan nýggju krøvini til dátutrygd og persónsdátutrygd seta størri krøv til skúlarnar og samstundis bæði til kommunur og land og er ein eyka kostnaður av hesum. Fyri allar kommunurnar undir einum verður mett, at eyka kostnaðurin til kt-økið hjá kommunum sambært hesum uppskotinum verður umleið 1,5 mió. kr. íalt.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Í sambandi við KT heildarætlanina fyri undirvísingarverkið er ein KT-eind skipað í Undirvísingarstýrinum, sum hevur um hendur at menna og seta í verk KT-heildarætlanina og veita skúlunum ráðgeving. Umsitingarligar útreiðslur kunnu verða fyri kommunurnar í sambandi við dátutrygd og eisini fyri landið til eyka tíð hjá skúlaleiðarum at umsita dátutrygd, serliga við atliti at persónsupplýsingum.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskptið hevur jaligar avleiðingar fyri vinnuna í sambandi við at menna skipanir til KT-heildarverkætlanina.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at lógaruppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum, men hevur í ávísan mun fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, sum víst á í pkt. 2.1.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir, men skúlanetið fer at geva øllum skúlum, næmingum og foreldrum javnbjóðis møguleikar í eini felags netskipan.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri uppskotið.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Tað eru ikki tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri uppskotið.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Sáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið elvir ikki til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki við sær revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið áleggur ikki skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið ásetur ikki reglur um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið er í samsvari við verandi áseting um, at kommunurnar hava ábyrgd av rakstrinum av skúlunum í kommununi og tilskilar, at raksturin fatar eisini um KT-skipanir, KT-útgerð, netsamband og dátutrygd.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur, men at kommunur í sambandi við rakstur í skúlum, rinda fyri KT-skipanir, KT útgerð, netsamband og dátutrygd. Hetta gera kommunur frammanundan, men tað er ikki tilskilað í lógini, hvat rakstur í fólkaskúlanum fatar um.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið gevur øllum skúlum somu atgongd til skúlanet og lestrarskipan.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**
**Til § 1**
Endamálið við uppskotinum er, at verandi reglur um rakstararútreiðslur gerast greiðari við atliti at kunningartøkni, so tað ikki verður ein tulkingarspurningur um KT-skipanir, KT-útgerð, netsamband og dátutrygd eru partur av rakstrarútreiðlunum í fólkaskúlunum.

Endamálið er samstundis, at allar kommunur virka fyri, at fólkaskúlarnir verða partur av KT-heildarætlanini og kunnu fullnýta møguleikarnar bæði við atliti at Skúlaneti og lestrarfyriskipanini, sum verða sett í verk fyri samlaða skúlaverkið.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 25. januar 2022

**Navn á landsstýrismanni**
Jenis av Rana

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: